## Kunnu skerja blokkin

Konservativi Fólkaflokkurin í Danmark vil hava Fólkatingið at seta búskaparlig tiltøk í verk ímóti grønlendska heimastýrinum, um heimastýrið ikki loysir trupulleikarnar við børnum, sum fáa ov lítið at eta. Per Ørum Jørgensen, sum er talsmaður hjá teimum konservativu í málum viðvíkjandi Grønlandi, sigur við Berlingske Tidende, at Fólkatingið eigur at skerja tann árliga blokkin, um teir grønlendsku politikararnir ikki loysa trupulleikarnar. Poul Ørum Jørgensen fer so langt sum at siga, at eftir hansara tykki eiga danir at umhugsa at steðga allari ríkisveitingini til Grønlands, verður málið ikki loyst.



# tveimum stovnum




Søldarfirði er sett til 18 mánaðir, og kostnaðurin av verkætlanunum liggur um 20 miljónir krónur.

### 40 fólk í arbeiði

Byggifyritøkan Búsetur hevur 40 fólk í arbeiði, og felagið hevur seinastu árini bygt fleiri stovnar kring landið. Eitt nú eru dagstovnurin á Hamrinum á Argjum og dagstovnurin á Velbastað projekteraðir og bygdir av Búsetur.

- Seinastu árini hava vit eisini bygt røktarheim, skúlar, fjós, sethús, og vit hava staðið fyri totalrenoveringum av fleiri stórum bygningum kring landið, sigur Hallur Hansen, arbeiðsformaður.




*Tað er byggifyritøkan Búsetur, sum stendur fyri verkætlanunum á Skála og í Søldarfirði. Einir 8 mans hjá fyritøkuni taka lut í hesum arbeiðum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Skipini koma flaggskrýdd til bygdar. Tað hevur gingið væl, síðan Hamranes og Breiðanes loystu undir nýggjum eigarum*

# Gongur væl hjá hvalbiar-trolarunum

**Tað hevur gingið væl hjá nýggju hvalbiartrolarunum, Hamranesi og Breiðanesi, síðan skipini fóru til fiskiskap undir nýggjum eigarum í februar mánaða í ár**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sløk 2000 tons. Tað er samlaða veiðan hjá nýggju hvalbiartrolarunum, Hamranesi og Breiðanesi, síðan skipini loystu fyrstu ferð undir nýggjum eigarum í februar mánaða í ár.

Í gjár landaði parið í Hvalba. Teir vóru fullir undir lúkurnar, harav stívliga ein triðingur av veiðini var góður toskur. Hin parturin av veiðini var upsi.

Tað má sigast at vera áhugavert og positivt, at toskur eisini er farin at síggjast aftur í veiðini hjá partrolarunum.

Hamranes og Breiðanes loystu ætlandi aftur í Hvalba seinnapartin í gjár.

Sum skilst, byrjaði hesin túrurin við ávísum trupulleikum teir fyrstu dagarnar, men seinastu fimm dagarnar hava skipini roynt eystanfyri og fingu uppí, áðrenn túrur var lokin.

### Vitja dúgliga

Seinastu tíðina hevur Fiskiveiðieftirlitið friðað ávísar leiðir á landgrunninum, tí ov nógvur smáfiskur hevur verið uppi í veiðini.

Sosialurin hevur frætt, at eftirlitið dúgliga hevur vitjað umborð á Hamranesi og Breiðanesi – ja, so dúgliga, at menn umborð næstan er farnir at kenna seg forfylgdar, sum tikið verður til.

Fiskiveiðieftirlitið er tó farið av aftur skipinum sum av torvheiðum, siga vælvitandi keldur í Suðuroy fyri Sosialinum.

Tað eru menninir aftanfyri djúpvatnstrolararnar, Steintór og Sjagaklett, sum saman við øðrum eiga, manna og reka Hamranes og Breiðanes, ið eru fyrrverandi Navarin og Borgarin, sum eru keyptir frá Føroya Banka.

Upprunaliga eru hetta gomlu Polarhav og Stjørnan, sum leirvíkingar áttu.